# -etandi gamalt hol






## Uppskot um nýggja farleið

Á fundið í Innlendismálaráðnum 3. november í fjør fekk Annika Olsen, landsstýriskvinna í Innlendismálum handað eitt annað uppskot uppá nýggjan tunnil millum Trongisvág og Hvalba.

Tað var Hvalbiar Kommuna, sum hevði fingið gjørt eitt uppskot við linjuføring og kostnaðarmeting.

Eftir ætlan skal tunnilin fara inn áleið við Sterling í Trongisvági og síðani koma út aftur beint innanfyri Káragjógv í Hvalba.

Hvalbiar Kommuna hevur fingið eina fyritøku at gera eina kostnaðarmetign at gera hesa linjuføringina, sum verður umleið 3300 metrar til longdar. Og metingin ljóðar uppá 150,7 mió krónur Tá er alt íroknað í tunnilinum.

Hvalbiar Kommuna heitti á landsstýriskvinnuna um at arbeiða við at fáa hetta uppskot fram so skjótt til ber, tí verandi støða er ótolandi fyri hvalbingar og vinnulívið í bygdini.

## Gloym alt um samanlegging

Sandvík og Hvalba eru avskorin, í ein stóran mun, frá restini av Suðuroynni.

Farleið okkara er alt ov lítil og ótrygg, á allan hátt. So leingi, ið eingin nýggj tunnel er millum Trongisvág og Hvalba, skal landsstýriskvinnan, í/við innlendismálum, gloyma alt um at leggja kommunurnar Suðuroynna saman.

Fólkið í Hvalba og Sandvík fer ikki at góðtaka at leggja saman við einum parti, ið tey, grundað á farleiðina, ikki føla seg vera ein part av.

*(Brot úr lesarabrævi hjá Niels Olaf Eyvindsson á Suðurrás)*

# Kommunan rindaði fyri tunnilin

Tað er ikki bert í Hvalba at fólk hava ynski um tunnil. Bæði fólk á Viðareiði, Tjørnuvík, í Svínoy og aðrastaðni hava sama ynski.

Fyri mong kann tað tykjast, sum um øll hesi ynskini verða sett upp ímóti hvørjum øðrum. Men tað ynskir Niels Olaf ikki at gera.

Hann vísir kortini á ein avgerandi mun á teimum tunlunum, sum vórðu gjørdir í 60'unum – teir báðir tunlarnir á Borðoynni og teir báðir í Suðuroynni.

Tá tunnilin til Hvalba varð gjørdur, var hann ikki bert fíggjaður av landskassanum. Hvalbiar kommuna fíggjaði tá sjálv ein part av arbeiðinum.

- Men tá tunlarnir á Borðoynni vórðu gjørdir, tók landið yvir og betalti fyri alt, vísir hann á. – Tað kundi tí verið áhugavert at fingið at vita, hvussu nógv Hvalbiar kommuna betalti í tunlinum og síðani renturokna og prístalsregulera tað, og so sent ta rokningina norðurum.

- So høvdu vit fingið ein, kanska tveir nýggjar tunlar fyri tann peningin.

**» Tað er ikki gott at vita, hvussu nógv 100 tons ið sita leys undir tunnilsloftinum og kanska detta niður ein dag**